# Ónýtiligt reinsiverk í Porkeri

*Porkeris Kommuna hevur eitt reinsiverk til drekkivatnið standandi, sum ikki kann brúkast. Og eingi útlit eru fyri nøkrum endurgjaldi frá seljaranum*


Porkeris Kommuna hevur eitt reinsiverk fyri 400 túsund krónur standandi, sum ikki kann brúkast
Mynd: Edvard Joensen

EDVARD JOENSEN

**Porkeri:** Vatnið í Porkeri er sera skitið. Undanfarna bygdarráð keypti eitt reinsiverk, sum, tá tað var liðugt uppsett, kostaði umleið eina millión krónur. Tá vóru aðrar íløgur enn bara sjálvt reinsiverkið íroknaðar prísin. Men tað verkið kann ikki brúkast. Og eingi útlit eru fyri endurgjaldi, tí keypssáttmálin er so ógreiður.

Inni í dalinum omanvert bygdina Porkeri stendur eitt lítið, reytt hús, sum húsar vatnreinsiverkinum, sum undanfarna bygdarráð keypti og setti upp til at fáa porkeningum reint vatn.

Reinsiverkið riggaði væl, og vatnið varð reint, men tá filtrið skuldi reinsast, bar ikki til. Tað er við reinsifiltrinum soleiðis vorðið, at tað klárar at hjálpa øðrum, men ikki sær sjálvum. Ymsir hættir hava verið royndir at fáa verkið at koyra. Sitandi bygdarráð hevur roynt nógvar møguleikar gjøgnum alla setuna, men einki vísir seg at bera til. Og nú er komið hagar til, at bygdarráðið hevur givið upp og er farið at royna annað verk.

Men eingi útlit eru fyri at fáa nakað endurgjald frá seljaranum, sigur Anna Larsen, bygdarráðsformaður í Porkeri. Grundin er tann, at keypssáttmálin er so ógreitt orðaður, at har eru vist eingir møguleikar fyri at fáa keyparan at taka anleggið aftur.

Anna Larsen sigur, at hóast anleggið ikki kann nýtast í Porkeri, er møguligt, at tað kann seljast aftur til Noregs, uttan at hon tó hevur nakað ávíst at hava vónirnar í. Tað er nevniliga soleiðis, at vatn er ikki bara vatn. Og hóast skitna vatnið í Porkeri hevur fingið reinsifiltrið at geva upp, kann vera, at norskt vatn er øðrvísi. Í hvussu er verða slík reinsiverk rúkt í Noreg, sigur Anna Larsen, bygdarráðsformaður í Porkeri.

Hon sigur, at hóast samlaða íløgan til reinsiverkið í síni tíð lá um eina millión, merkir tað ikki, at allir pengarnir eru burtur. Sum sagt fara tey at royna at selja verkið aðrastaðni. Sjálvt reinsiverkið kostaði einar 400.000,- krónur. Restin av íløguni, so sum hús, leiðingar og annað, verður verðandi í Porkeri og kann væl nýtast í samband við eitt nýtt reinsiverk.

Vatnið í Porkeri er so vánaligt, at Roykivirkið hevur fingið sær egið reinsiverk, tí tað ber stutt sagt ikki til at brúka kommunala vatnið til matframleiðslu.

-So kann onkur halda, sigur Anna Larsen, at kommuna røkir ikki sínar skyldur. Men í grundini hevur kommuna onga lógarfesta skyldu at lata borgarunum vatn. Tað er bara ein tænasta komunan veitir.

Tað merkir tó ikki, at Porkeris Kommuna fer at sleppa sær undan at veita borgarunum vatn, hóast tað gongur illa í løtuni at fáa tað reint. Tvørtur í móti arbeiða tey við at fáa nýtt reinsiverk.

Anna Larsen sigur, at tey kundu saktans latið klor í vatnið, so tað gjørdist klárari, men kortini ikki reinari sum so.

Bygdarráðsformurin í Porkeri sigur, at tosað hevur verið leysliga um aðrar møguleikar, sum kanska tykjast eitt sindur fjarir, men tó ikki eru ómøguligir. Sum til dømis at leiða vatn í rørum um fjørðin av Økrum.

Anna Larsen leggur dent á, at her er einki gjørt kortini. Hvørki kanningar ella projektering. Men teknískt er tað væl gjørligt, ivast hon ikki í.

Av øðrum arbeiði er ikki tað stóra í gongd í Porkeri í løtuni, sigur Anna Larsen, bygdarráðsformaður. Uttan tað, at vegirnir, sum mangla asfalt verða asfalteraðir í næstum. Hetta er ein íløga upp á einar 200.000,- krónur, sigur Anna Larsen, bygdarráðsformaður í Porkeri.

# Zacharias um gamlar gøtur

*Zacharias Hammer er farin undir at savna tilfar til sjónvarpsrøð um gomlu, føroysku bygdagøturnar*

Ætlanin er nú at gera sjónvarpsrøð um gomlu føroysku bygdagøturnar. Tað er Zacharias Hammer, sum saman við heimildarfólki ymsastaðni frá fer at gera sendingarnar.

Zacharias Hammer sigur, at tað er ein gamal tanki, hann nú er farin undir at føra út í lívið. Enn er endaliga konseptið ikki gjørt, sigur hann, og kanska verða ymsar broytingar gjørdar, sum tað líður út.

Fyrstu upptøkurnar til røðina verða gjørdar í Suðuroy um dagarnar. Farið verður fyrst til Fámjins og síðan til Hvalbiar, sigur Zacharias Hammer, sjónvarpsmaður.

Hann sigur, at ætlanin er í fyrstu syftu at gera tríggjar upptøkur, nú so væl er liðið á árið. Hann heldur eisini, at ár 2000 er eitt gott høvi at lýsa farna tíð, samstundis sum gingið verður inn í tað nýggja.

Tær báðar fyrstu upptøkurnar, ætlar Zacharias, skulu gerast í Suðuroy, meðan tann triðja verður í syðra enda á Kallsoynni.

Í fyrsta partinum av upptøkunum fer Zacharias at hava Jákup Paula Nielsen út Vági sum heimildarmann. Jákup Pauli, sum er ættaður úr Fámjin, vann herfyri ritgerðarkappingina hjá Fróðskaparsetri Føroya um gomlu bygdagøturnar.

Zacharias Hammer sigur, at hann fer at fáa Jákup Paula Nielsen at siga frá, hvussu gøturnar eita, hvaðani nøvnini stava, hvussu gøturnar vórðu brúktar, hvør brúkti tær og so framvegis.

- Kanska fara vit at møta onkrum á leiðini, sigur Zacharias, og leggur aftrat, at Jákup Pauli Nielsen eisini hevur havt áhuga í tí yvirnatúrliga. Og onkur søgan man vera um onkran stein, sum fólk eru komin fram við í myrkri, heldur hann.

Zacharias Hammer sigur, at ein bági er tó, at fleiri av heimildarfólkunum eru komin so væl til árs, at tey líkasum halda seg ikki til at ganga allar gøturnar, so tí verður neyðugt at gera fleiri av upptøkunum aðrastaðni enn á sjálvum gøtunum. Tað harmast hann um, men ásannar, at soleiðis er tað nú einaferð, og skulu sendingarnar bjargast, er neyðugt at gera tað soleiðis.

Onnur ferðin verður úr Hvalba upp á Tvøroyri. Har er tað áhugaverda eisini, sigur Zacharias, at fyrsti tunnilin í Føroyum liggur undir gøtuni millum Trongisvág og Hvalba.

Síðan er ætlanin at fara í Kallsoynna, greiðir hann frá. Har verður ein útdeyð bygd tikin. Nevniliga Blankskáli.

Heimildarmaður á Kallsoynni verður Erik Eliasen á Syðradali.

Zacharias Hammer heldur tað vera áhugavert at taka ein ygd, sum er avtoftað saman við teimum verandi. Tað líkasum setir alt eitt sindur í perspektiv.

Men Zacharias Hammer tekur aftur í aftur, at endaliga konseptið fyri sendirøðina er ikki lagt enn. So tað kann verða, at alt broytist, eftir at upptøkurnar eru gjørdar.


Zacharias Hammer er farin undir nýggja sjónvarpsrøð um gomlu føroysku bygdagøturnar
Mynd: Edvard Joensen



# Noydd at nassa gøgn

*Orsakað av at danska Løgmálaráðið enn ikki hevur fylgt eini áheitan frá løgtinginum frá 1996, kunnu føroyingar í Føroyum ikki lata hjørtu, lungu og livrar til at flyta í onnur fólk. Vit hava bert loyvi at taka ímóti*


Tað er ikki tað sama at vera deyður í Føroyum, sum í Danmark og øðrum Norðurlondum. Orsøkin er, at løgmálaráðið hevur súltað eina áheitan um at seta í gildi heiladeyðakriterii í Føroyum

JOHN JOHANNESSEN

**Bakgrund:** Hevur ein føroyingur so álvarsama hjartasjúku, at hann er noyddur at fáa nýtt hjarta, ber væl til at fáa hetta gjørt á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Fríska hjartað fær føroyingurin frá onkrum dana ella øðrum útlendingi, ið av einari ella aðrari orsøk er heiladeyður og sostætt í Danmark kann staðfestast at vera kliniskt deyður. Treytin er bert, at hesin – tá hann var á lívi - hevur skrivað undir uppá, at hann vil lata gøgn síni ella, at tey avvarðandi geva loyvi til hetta.

Føroyingar kunnu sostætt uttan stórvegis trupulleikar fáa nýggj gøgn frá dønum.

Men harafturímóti er tað als ikki loyvt føroyingum í Føroyum at lata onnur gøgn enn nýru. Í Føroyum er nevniliga ikki loyvt at staðfesta, at ein persónur er deyður, fyrr enn hjartað er steðgað. Og tá eru bæði hjartað, lungu og livur ónýtilig at lata til onnur fólk.

### Súltað í Danmark

Tað eru kortini ikki føroyingar sjálvir, ið hava skuldina av, at vit ikki kunna lata gøgn, men bert taka ímóti.

Orsøkin til støðuna er, at danska Løgmálaráðið enn ikki formliga hevur sett í gildi ríkislógartilmælið við kongaligari fyriskipan, sum løgtingið í juni 1996 samtykti at fáa sett í gildi.

Tá løgtingið í 1996 samtykti eina áheitan frá táverandi landsstýrimanninum í heilsumálum, Andreasi Petersen um, at ríkislógartilmælið skuldi setast í gildi í Føroyum, vórðu allar vanligar mannagongdir fylgdar. Løgtingið vendi sær eftir samtyktina til landsstýrið við málinum, sum síðani heitti á ríkisumboðið um at senda Løgmálaráðnum málið.

Løgmálaráðið skal nevniliga góðtaka samtyktina og koma við møguligum broytingum, áðrenn ríkislógartilmælið endaliga kann setast í gildi í Føroyum.

Men hóast fýra ár eru liðin síðani hetta varð gjørt, er málið enn ikki komið víðari.

### Reist á fólkatingi

At tað í Føroyum ikki ber til at staðfesta, at ein persónur er deyður, tá hann er heiladeyður, kemur illa við hjá læknum í Føroyum. Tí hava teir fleiri ferðir rykt myndugleikarnar eftir at fáa lógina lýsta.

Somuleiðis hava feløg, ið røkta áhugamál sjúklinganna, eisini lagt trýst á myndugleikarnar, um at fáa hesa lóg, sum jú er samtykt, setta í gildi.

Ríkisumboðið hevur langt trýst á Løgmálaráðið um at fáa málið avgreitt. Seinast ríkisumboðið gjørdi hetta var í oktober 1999. Men kortini hendi einki.

Í februar í ár reisti føroyski fólkatingslimurin, Jóannes Eidesgaard, málið á fólkatingi í einum skrivligum fyrispurningi til danska løgmálaráðharran, Frank Jensen.

Jóannes Eidesgaard vildi hava at vita, nær tað kundi væntast, at lógin fór at verða sett í gildi fyri Føroyar.

Ellivu dagar seinni svaraði danski løgmálaráðharrin, at Løgmálaráðið tá umhugsaði, um tað bar til at seta í gildi nøkur serlig viðurskifti í partinum um líksýn, sum føroysku viðurskiftini krevja. Her sipaði løgmálaráðharrin helst til rættin hjá fiskiskiparum at staðfesta deyða.

Frank Jensen segði tó vænta, at Løgmálaráðið fór at verða liðugt við eitt útkast at leggja fyri landsstýrið einaferð í ár.

Tað er nevniliga so, at um Løgmálaráðið ger broytingar orðingini, løgtingið hevur samtykt, skal Løgmálaráðið senda landsstýrinum broytingarnar, soleiðis at føroyskir myndugleikar kunnu góðtaka tær.

### Liggur í einum stakki

Sosialurin hevur vent sær til Løgmálaráðið fyri at fáa at vita, hvussu langt Løgmálaráðið er komið við málinum.

Men sambært teimum upplýsingum, Sosialurin hevur fingið frá embætisfólkum í Løgmálaráðnum, er einki meira hent í málinum higartil.

– Málið liggur millum fleiri onnur mál, sum skulu avgreiðast í Løgmálaráðnum, og ofta stinga mál seg upp, sum hava størri týdning at viðgera beinan vegin, eru boðini úr Løgmálaráðnum.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, heldur, at hetta ber boð um, at føroysku málini altíð enda niðast í dungunum av teimum málum, ið skulu viðgerast. Men hetta heldur hann kortini ikki vera løgið, tí Løgmálaráðið er jú til fyri viðgera donsk mál.

Í Løgmálaráðnum liggja í løtuni 14 ríkislógartilmæli og bíða eftir at verða sett í gildi í Føroyum. Men boðini eru framvegis, at Løgmálaráðið fer at senda landsstýrinum eitt útkast til ríkislógartilmælið um líksýn, líkskurð og flyting av gøgnum í ár.

# Føroyingar ongan myndugleika

Danski uttanríkisráðharrin ger í brævi ST vart við, at landsstýrið onga fólkarættarliga heimild hevur at venda sær til ST í sambandi við fullveldissamráðingarnar

Uttanlandsdeildin í landsstýrinum sendi annars beint áðrenn ólavsøku ST bræv, har spurt var um, hvørjar mannagongdirnar eru fyri at fáa ein triðja part upp í samráðingar, sum tær millum landsstýrið og donsku stjórnina.

Í sambandi við, at ST hevur heitt á donsku ST-umboðsstovuna um at greiða frá málinum, hevur Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri sent ST eitt bræv, har hann sigur, at føroyingar í heimastýrisskipanini ikki hava heimild at heita á ST uttan loyvi frá donsku stjórnini. Og danska stjórnin hevur ikki givið landsstýrinum loyvi til hetta.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður heldur, at hetta enn einaferð sýnir okkum, at Føroyar einki hava at siga í altjóða samanhangi, og tí er neyðugt at fáa fullveldi.

